# Gulldansur í Vestmanna




*Daniel Rápa hevur verið nógv skaddur tey árini, hann hevur verið í Føroyum, men seinastu mánaðirnar hevur hann veruliga tikið ábyrgd á seg, tá hetta var mest tiltrongt*

**Eftir tvey ára fráveru kom FM-steypið aftur til Vestmanna leygardagin, tá VÍF við sigri á StÍF fekk sett eitt flott punktum fyri kappingarárinum**

MEISTARAR

*orð: Jákup Mørk,*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Ivaleyst vóru vestmenningarnir fegnir um, at gullstríðið var avgjørt, longu áðrenn StÍF kom á vitjan. Er tað nakað lið, sum hevur sett kílar í hjá VÍF seinastu árini, so eru tað fyrst og fremst strandingarnir, sum javnt og samt hava argað vestmenningarnar – bæði í lands- og steypakapping.

## Gekk striltið

Fyrsta langa partin av dystinum tóktist tað eisini, sum skuldu strandingarnir oyðileggja VÍF dagin. Við frálíkum málmansspæli av Marian Cirloganescu og óghugnaligu skotstyrkini hjá Justinussen beiggjunum, vóru tað alla tíðina gestirnir, sum høvdu betra takið á dystinum. Vestmenningarnir royndu at fylgja við, men fyri tað allar mesta gekst hetta sera striltið, og kanska restaði seinasti neistin eisini í, nú spurningurin longu var greiddur fyri teirra viðkomandi

Í so máta hevði StÍF meira at spæla fyri, tí við einum sigri kundu teir fara framvið Kyndli á talvuni, um úrslitini annars lagaðu seg. Men tað gjørdu tey ikki, og kanska høvdu meldingarnar av Hálsi í hálvleikssteðginum eisini sína ávirkan.

Í øllum førum vóru strandingarnir als ikki líka tendraðir, tá farið varð undir seinna hálvleik. VÍF kom nú alt betri við, og tá StÍF so eisini misti Svein Justinussen – breyt allar helst ein fingur – kom kinkur av álvara í.

Og so tóku vestmenningarnir av. Seinasta korterið av dystinum vendu teir 21-24 til endastøðuna, 30-27, og fyri hvørt málið, sum nú varð skotið, gjørdist rómurin í høllini alt ljóðligari. Og tá seinasta bríksli hevði ljóðað, var leyst og liðugt. Kanska var rómurin ikki so stórur, sum tú skuldi hildið, men í Vestmanna eru tey jú von við gullið. Heldur var talan bara um stór smíl alla staðni, tá Palli Joensen í frásøguleiklutinum seði frá um spælararnar, meðan gullið varð hongt um hálsin og steypið fingið til høldar.

Vit lata myndirnar frá degnum tala fyris eg.